Tað er ikki nóg mikið, at fiskurin smakkar væl og sær væl út. Nú vilja normenn eisini nýta stóra karnivalið í Rio til marknaðarføring av klippfiski

Dansa samba fyri norskum fiski

4.000 sambadansarar skulu marknaðarføra norskan klippfisk í Rio de Janeiro í februar.

MARKNAÐARFØRING

Árni Joensen
arni@sosialurin.fo

Í februar verður aftur karneval í Rio, men hesaferð verður dansiveitslan eitt sindur øðrvísi, tí norðmenn hava sett sær fyri at brúka tiltakið gera at gera eitt átak fyri norskum klippfiski. Nevndin, sum stendur fyri átakinum, hevur havt samband við tveir sambaskúlunum í Rio de Janeiro, og teir hava játtað at lata millum 4.000 og 5.000 dansarar marknaðarføra norskan klippfisk.

Knut Haagensen, sum er formaður í fyrireikingarnevndini, sigur við Nordlys, at átakið hevur eitt marknaðarvirði upp á fleiri hundrað milliónir krónur. Tað fer kortini ikki bara at ganga klippfiskinum, men eisini norsku ferðavinnuni og norskum handils- og vinnulívi sum heild, sigur hann.

Higartil hava fyrireikararnir savnað góðar fýra milliónir krónur til átakið í Brasil, men enn resta einar fimm milliónir krónur í, áðrenn alt er figgjað.

Í fiskimálaráðnum í Oslo taka tey undir við átakinum í Rio. Har verður sagt, at tað er sera umráðandi fyri Noreg at varðveita tann brasilska marknaðin og at menna hann. Tey halda tað eisini vera sera áhugavert at brúka dansiveitsluna í Rio sum høvi til at marknaðarføra klippfiskin.

Basil er næststørsti klippfiskamarknaðurin hjá norðmonnum, og árliga keypa brasilar norskan fisk fyri hálva aðru milliard krónur.

– Men tað eru ikki bara fólk í Brasil, sum fylgja við tí, sum hendir í Rio í februar. Fólk um allan heim og serliga í teimum katólsku londunum síggja sjónvarpssendingar frá dansiveitsluni, so tey eru mong, sum verða kunnað um klippfiskin úr Noregi, sigur Knut Haagensen.

Hetta er helst eisini seinasta høvi at brúka dansigenturnar í Rio til at marknaðarføra norskan fisk. Frá 2008 skulu øll dansiliðini dansa fyri tí sama, og tá verður prísurin væntandi so høgur, at norski fiskaídnaðurin verður ikki førur fyri at rinda kostnaðin.

Partabrøv lækkaðu

MARKNAÐARRÁK

Vika 44

Í farnu viku nevndu vit, at útlit vóru fyri, at partabrøv fóru at lækka eitt sindur innan alt ov leingi. Tað tykist nú sum ein minni lækking byrjaði í farnu viku. Hetta var galdandi á flest øllum marknaðum, bæði í USA, Evropa og Fjareystri. Kunngjørt var, at amerikanski búskapurin fyri 3. ársfjórðing var hækkaður 2,9% í mun til fyri ári síðani. Hetta var væl minni enn væntað, og var við til at fáa partabrøv at lækka. Eisini hevur tað týdning, at partabrøv eru hækkað 10%-15% upp á 4 mánaðir, og at íleggjarar nú taka nakað av hesum vinningi heim við at selja partabrøv. Roknskaparkunngerðirnar eru framvegis góðar, og virkini halda á at vinna meir enn íleggjarar væntaðu. Langtíðarútlitini eru tí framvegis góð.

Lánsbrævarentur lækkaðar

BTÚ-tølini úr USA fingu lánsbrævarenturnar at lækka í farnu viku. 10-ára rentan er í løtuni 3,87%, hetta er 0,12% lægri enn 1-árs rentan. Hetta bendir á, at lánsbrævaíleggjarar ikki vænta nakran prísvøkstur.

Danske Bank kunnger roknskap

Danske Bank kunnger roknskap beint eftir evstamark ídag. Útlit eru fyri, at roknskapurin verður uppmettur so samlaða úrslitið kann gerast eins gott og 2005. Væntaða framgongdin skyldast m.a. eini væntaðari hækking í nettointøkunum uppá 10% í mun til 3. ársfj. 2005. Mest sannlíkt verður sølan av RD høvuðssætinum og afturføringar frá áðurframdum niðurskrivingum bókaðar hendan ársfjórðingin. Hóast ein góður roknskapur er væntaður av marknaðinum, meta vit at kursurin á partabrævinum kann fara at hækka meira enn marknaðurin annars.

Hesa vikuna

Hendan vikan verður hendingarík á marknaðunum. Eftir laka amerikanska búskaparvøksturin í farnu viku, verða eyguni havd við amerikanska arbeiðsmarknaðinum. Og hesa vikuna kemur m.a. arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri oktobur. Harumframt hevur ECB rentufund, og har verður sitið undir hvørjum orði.

Donsk 10-ára renta



Vísital fyri norrøn partabrøv



Gjaldoyru

	Kursur	+/- %
USD	585,80	-1,4%
JPY	4,99	0,2%
GBP	1.114,04	0,1%
NOK	89,52	1,0%
SEK	80,95	-0,1%

Virðisbrøv

Norrøn	Kursur	+/- %
Lánsbrøv í DKK	98,42	0,0%
Norrøn Partabrøv	117,66	-0,9%
VMF	**Kursur**	**+/- %**
Atlantic Petroleum	590,00	-2,6%
KB Trygg Eurostoxx	106,65	0,0%

Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.